## Telenor stóra bót

Ein dómstólur í russiska býnum Omsk hevur dømt norska telefelagið Telenor at gjalda felagnum Farimex 11,6 milliardir norskar krónur í endurgjaldi. Telenor boðaði alt fyri eitt frá, at dómurin verður skotin inn fyri hægri rætt, tí sambært norska felagnum er talan um eina misskiljing. Farimex, sum er skrásett á Bretsku Jomfrúoyggjunum, vil vera við, at Telenor hevur darvað royndum felagsins at keypa ukrainska telefelagið URS og kravdi tí endurgjald. Telenor sigur harafturímóti, at rættarmálið hevur bara til endamáls at forkoma íløgunum, sum Telenor hevur gjørt í Russlandi.

## Eldur í bátasmiðju

Eldur kom í nátt í tvær hallir hjá Bach-bátasmiðjuni í Hvalpsund, sum er nakað norðan fyri Viborg. Løgreglan veit ikki, hví eldur brádliga kom í aðra av hallunum. Tær báðar hallirnar eru samanbygdar, og eldurin breiddi seg skjótt til hina høllina. Tað eydnaðist kortini at bjarga teimum bátunum, sum stóðu í aðrari høllini, men inni í hinari fór alt upp í royk, skrivar Ritzau. Í morgun hevði sløkkiliðið fingið tamarhald á eldinum, men tá var tann seinna høllin eisini brunnin niður.

# vikuna



*Eftir at laksurin er blóðgaður og útbløddur, verður hann lagdur í kryvjimaskinurnar, áðrenn hann fer víðari til vrakararnar*



*Faroe Salmon Processing heldur til í einum bygningi á Dávakeiini*



*Kryvjivirkið er sera framkomið, og hevur millum annað hendan robottin, sum stálpar laksakassarnar til útflutnings á átta ymiskar plattar*

### Framkomið virki

Tað fer rættiliga nógvur fiskur ígjøgnum á kryvjivirkinum í Klaksvík.

- Vit hava arbeitt nú í fleiri vikur 470 til 480 tons um vikuna. Tað hevur viðrað væl, so vit hava tikið ímóti fiski hvønn dag, tað skal jú viðra, annars fáa teir ikki tikið fiskin, sigur Jóhann Mørkøre.

Tað hevur viðrað væl í einar átta vikur, so arbeiði hevur verið á virkinum hvønn dag hesa tíðina.

- Arbeiði er á virkinum so at siga alt árið, men tað er ikki hvørja viku, at arbeitt verður seks dagar um vikuna. Men vit arbeiða nú fast alt árið, sigur Jóhann Mørkøre.

Sjálvt virkið er ógvuliga framkomið, og ein stórur partur verður gjørdur við ymsum maskinum, sum eru teldustýrdar.

- Eg haldi, at virkið er so framkomið, sum tað ber til. Vit hava alla ta nýggjastu útgerðina, sum finst. Vit hava gradarar, kryvjimaskinur, robott, automatiskan viklara. Vit hava mest framkomnu útgerðina, sigur Jóhann Mørkøre.

Robotturin er ein teldustýrdur krani, sum leggur pakkaðu flamingokassarnar á plattar eftir sortering, og umvegis telduna finnur robotturin út av, á hvønn platt hvør kassi skal.

Eisini er ein ísmaskina á virkinum, so teir framleiða sjálvir tann ísin, sum laksurin veður ísaður við, áðrenn hann verður avskipaður.

Hetta, at virkið er so automatiserað sum tað er merkir eisini, at tað krevst ein ávís upplæring til fleiri av arbeiðunum.

- Tað ber ikki til at koma beint inn av gøtuni at gera eitthvørt arbeiði her á virkinum. Men nógv av starvsfólkunum hava arbeitt á virkinum í fleiri ár, og hava tí drúgvar royndir, sigur Jóhann Mørkøre.

### Sjálvbjargnir

Tað var ikki Bakkafrost, sum upprunaliga bygdi virkið. Tað var eitt annað felag sum fór undir hetta virksemið í Klaksvík, men tá alivinnan varð rakt av niðurgongd, hóraði hetta virkið ikki undan, og so keypti Bakkafrost virkið. Hetta var í 2006.

Bakkafrost er sjálvbjargið á so at siga øllum økjum. Teir eiga alibrúk, kryvjivirki og so eiga teir eisini eitt kassavirki, sum framleiðir flamingokassarnar, sum laksurin verður útfluttur í.

- Ja, vit nýta bæði flamingokassar og fiskakør at flyta fisk í. Tað, sum fer til útflutnings verður pakkað í flamingokassar, sum Bakkafrost sjálvt framleiðir, meðan tað, sum fer út á Bakkafrost til portiónir, verður flutt í fiskakørum, sigur Jóhann Mørkøre.

Nógv verður flutt til USA sum flogfrakt, og har verða nýttir serligir flamingokassar, sum eisini verða framleiddir av Bakkafrost.

Tað er sostatt nógvur flutningur, bæði til og frá kryvjivirkinum í Klaksvík. Livandi laksurin kemur gamaní frá brunnbátinum, men harfrá verður alt flutt við trailarum. Bæði tað, sum fer til Bakkafrost og til útflutnings, og tað, sum kemur frá Bakkafrost, nevniliga flamingokassar og kør.

- Har hevur undirsjóvartunnilin ómetaliga stóran týdning. Tá vit skuldu flyta alt um fjørðin, bíðaðu bilarnir javnan í fleiri tímar, og eg ivist í, um tað hevði borið til nú. Nú koyra trailararnir alla tíðina, bæði til og frá okkum, so tað hevði verið ótrúliga trupult, vænti eg, sigur Jóhann Mørkøre.

Hann heldur at framtíðin sær bjørt út hjá alingini í dag.

- Øll, sum hava skil fyri aling eru bjartskygd, so eg síggi bara ljóst upp á framtíðina, eisini hjá okkum her á Faroe Salmon Processing, sigur Jóhann Mørkøre, dagligur leiðari.